einfaldari
- ger tað einfaldari
Februar 2012

# Til Ísraels á páskum



Lofti-ferðir skipa fyri einum túri til Ísraels í døgunum 2. til 14. apríl 2012. Tað eru Marner av Lofti og Jógvan Zachariassen, sum skipa fyri túrinum.

Les meira um ferðina og finn allar viðkomandi upplýsingar á www.loftiferdir.fo

Áhugað kunnu tekna seg hjá:

Marner av Lofti tel. 609183
mail: marneravlofti@gmail.com

Jógvan Zachariassen tel. 522212
mail: jogvanz@gmail.com

Maigun Otthamar tel. 219141
mail: maigun@loftiferdir.fo

lívdin
– í lívd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Bíblian - 66 kærleiksbrøv



Vit fara nú eina ferð gjøgnum Bíbliuna og vóna at skapa eina heildarmynd av Bíbliuni komandi tríggjar mánaðirnar. 2. Tim. 3:16-17 sigur: “Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi, so gudsmenniskjað kann verða fullkomið, ført fyri at gera alt gott verk.” Allar talurnar fara at hava sama leist: (1) Innlit í hendan parting av skriftunum, og hvussu hann passar inn í heildarmyndina, (2) hvat vit læra um Gud í hesum partinum av skriftunum, (3) hvat Gud lærir okkum um okkum, (4) evangeliið í hesum partinum av skriftunum, og (5) hvønn týdning hevur hetta fyri meg persónliga. Undirvísararnir verða Símun Absalonsen, Høgni Jóhannessen, Gunnar Nielsen og Jógvan Zachariassen.
Biðið fyri røðini og bjóðið fólki við, soleiðis at mong kunnu fáa heildarmyndina av skriftunum og undurfulla boðskapin um Jesus Kristus.

*Jógvan Zachariassen*

# HENDINGAR & TILTØK

## Familjan Guttesen í Italia

Í tíðindabrævi frá trúboðaratænastuni Akrinum til samkomur og stuðlar í Føroyum skriva Heidi, Regin og Noah Guttesen m.a., at samkoman La Fonte, sum tey eru í ferð við at stovnseta í Pietracatella í Italia, enn er lítil, men tey gleðast um at fleiri og fleiri fólk vísa boðskapinum áhuga og nærkast krossi Kristusar.



La Fonte er fyrsta evangeliska samkoman nakrantíð í Pietracatella, og tí vita tey, at tað fer at taka rúma tíð at “bróta ísin”. Men við áhaldni teirra og okkara og við hjálp frá Gudi trúgva tey, at tað fer at bera til at síggja eina italska evangeliska samkomu stovnsetta í býnum, sum fer at vera eitt ljós fyri mong, og sum í framtíðini fer at standa á egnum beinum uttan hjálp frá okkara trúboðarum.
“Hetta er okkara bøn og vón. Hetta er okkara visión. Vit trúgva, at saman fara vit at náa hesum endamáli,” siga Heidi, Regin og Noah Guttesen úr Italia. Býurin Pietracatella er nærhendis Campobasso í Suðuritalia.

## TeenStreet 2012




Tilmeldingin til TeenStreet 2012 er byrjað. Legan verður í Oldenburg í Týsklandi frá 28. juli til 4. august. Les meira um ferðing og prísir á www.teenstreet.fo undir "Alt um TS2012". Seinasta freist at tekna seg er 22. apríl.

## Til lukku við barninum

15. januar fingu Hanna og Gunnar Nielsen í Hoyvík eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3.900 gr.

## Lindin sent í 12 ár

Leygardagin 21. januar vóru 12 ár liðin, síðan kristiliga útvarpsrásin Lindin byrjaði sínar sendingar. Hetta varð hátíðarhildið við eini sending tann dagin við práti við fleiri gestir.

Lindin
KRISTILIGT KRINGVARP

## Kvinnan í samkomuni




Sjónvarpsrásin IKTUS sendir regluliga talur frá Lívdini. Eftir ætlan verður byrjað at senda røðina "Kvinnan í samkomuni" v/ Jógvani Zacharissen um hálvan februar.
IKTUS sæst í Tórshavn frá sendara á Nólsoy, bæði analog og digitalt (Leita manuelt á kanal 34 - 578 Mhz). Ætlanin er at fáa sendara aftur á Varða skjótt.
Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.

## Ikki løtuverk

*"At koma at kenna Gud er ikki løtuverk. Gud opnar seg ikki fyri einum, sum kemur í skundi til Hansara og er horvin líka skjótt aftur. At brúka tíð saman við Gudi er loyndarmálið fyri at koma at kenna Hann inniliga og at njóta signingar Hansara."*



*Edward McKendree Bounds*

Sitat frá sunnudegnum 1. januar 2012 eftir Edward McKendree Bounds (1835 – 1913).

## Lívdin til Zarepta




Vikuskiftið 16.-18. mars hevur Lívdin samkomulegu á Zarepta. Enn eru fyrireikingarnar til leguna ikki veruliga byrjaðar. Á legunum í Zarepta plagar dópur at vera. Um onkur umhugsar at lata seg doypa á leguni, kann viðkomandi venda sær til onkran í samkomuleiðsluni ella senda t-post til livdin@livdin.fo. Skipað verður fyri dópsskeiði áðrenn leguna.

## Alt av náði




Herfyri kom bókin "Alt av náði" út til øll húski í Føroyum. Lívdin hevur fingið nøkur eintøk av bókini, sum fólk kunnu fáa hendur á til at lata familju, vinum og kenningum ókeypis. Bøkurnar eru at fáa á kunningarborðinum, meðan møtini eru sunnudag, og í Lonini oman Hoydalar 28.

## Bønarmøtir

Týskvøld kl. 20.30 er bønarmøti í Lonini oman Hoydalar 28. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til bøn. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

## Skráin fyri týskvøldini februar 2012

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 7 . februar | Bønarmøti |
| Týskvøldið 14 . februar | Bønarmøti |
| Týskvøldið 21 . februar | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 28. februar | Trin 2: Andaligur búnaskapur (1/2) |



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

### Sunnudagin 5. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Beinta Áargarð sigur frá |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv: Hvat meina vit um skriftirnar<br>Talari: Símun Absalonsen |
| UngLív kl. 12.00: | Evni: Hvør var Jesus andaliga<br>Undirvísari: Hallur av Rana |

### Sunnudagin 12. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Regin Hammer hevur eitt orð |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:<br>Einaferð var tað... (1.-5. Mósebók)<br>Talari: Høgni Johannesen |
| UngLív kl. 12.00: | Evni: Hví doyði Jesus |

### Sunnudagin 19. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Leikur v/Jens Wang |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:<br>...Gud, sum skrivar søgur... (Josva-Ester)<br>Talari: Gunnar Nielsen |
| UngLív kl. 12.00: | Evni: Umsorgan – aksept<br>Undirvísari: Rachel Eysturtún |

### Sunnudagin 26. februar

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | Páll Poulsen o.o.: Verkið í Suðurgrønlandi |
| Hoyvíksmøti kl. 12.00: | Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:<br>...um øll lívsins viðurskifti... (Job-Hásongurin)<br>Talari: Jógvan Zachariassen |
| UngLív kl. 12.00: | Sosialt tiltak |
| | |
| Ungdómstiltøk: | Alive: leygarkvøld kl. 21.00 |

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni


Beinta


Símun


Regin


Høgni


Jens


Gunnar


Rachel


Jógvan

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*